Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 4 |
| Tíð: | 14-04-2023 klokkan 13:00 – 14:30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Robert Vilhelmsen, limur. Julianna Klett hevði forfall og kundi ikki møta.

**Fundarskrá:**

1. Fundarfrágreiðing #3
2. Skipa okkum av nýggjum
3. Fyrireiking til Eldradagin 2023
4. Ymiskt

## AD 1 Fundarfrágreiðing #3

Fundarfrágreiðing  #3 2023 varð lisin og góðkend.

## AD 2 Skipa okkum av nýggjum

Síðani Bjørghild Djurhuus segði seg úr Eldraráðnum, hava vit ikki havt nakað næstforfólk. Vit heittu á Robert Vilhelmsen um at gerast næstformaður, og hetta játtaði hann. Robert er tí nú alment næstformaður í Eldraráðnum í Tórshavn.

## AD 3 Fyrireiking til Eldradagin 2023

Vit eiga  longu nú at byrja at fyrireika árliga eldradagin, sum verður um mánaðarskiftið september – oktober.
Eitt uppskot er, at varpa meira ljós á landsins borgarar, sum eru 60+. Kanska í samstarvi við Landsfelag pensjónista og onnur eldrafeløg í landinum.
Sambært upplýsingar frá Hagstovuni er aldursbýtið av 60+ fólkum í Føroyum hetta:

| Aldur | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| 60-64 | 1535 | 1553 | 3088 |
| 65-69 | 1407 | 1331 | 2738 |
| 70-74 | 1277 | 1282 | 2589 |
| 75-79 | 1002 | 958 | 1960 |
| 80-84 | 625 | 664 | 1289 |
| 85-89 | 307 | 413 | 720 |
| 90-94 | 134 | 250 | 384 |
| 95-99 | 28 | 82 | 110 |
| Tilsamans | 6315 | 6533 | 12848 |

Í Tórshavnar kommunu búðu í 2019 3.307 borgarar í aldrinum 60-75 sambært Gallupkanning, Eldraráðið lat gera, og 87% av hesum búðu í egnum sethúsum/raðhúsum//tvíhúsum. Serliga tey, sum búðu í sethúsum, ynsktu at skifta til minni bústað, um hesin var nøktandi.
Tórshavnar kommuna ger eitt stórt arbeiði at skaffa bústaðir fyri røktarkrevjandi borgarar, meðan vit halda, at kommunan hevur gloymt tey, sum ikki krevja røkt, men ynskja at skifta bústað.
Hetta kundi verið eitt upplagt evni at taka upp á eldradegnum.

Livikostnaðurin hækkar sum ongantíð fyrr í nýggjari tíð. Lønir fara upp, og tiltøk vera sett í gongd fyri at hjálpa teimum, sum hava lítið at liva av. Stórt sæð øll skulu fáa lønarlyft. Tað einasta, sum stendur í stað er fólkapensjónin og samhaldsfastið. Hetta sýnist ikki at hava áhuga hjá landsins politikarum. Tíverri er eisini mest sum tøgn hjá teimum umleið 10.000 pensjónistunum. Hetta er eisini eitt upplagt evni til eldradagin. Í Paris fara tey út á gøturnar.

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Tosað var um, hvussu heimahjálpin riggar. Avtalan um, at øll, sum eru fylt 75, fáa vitjan, verður ikki hildin. Og ein kanning átti at verðið gjørd, hvussu tey sum fáa heimahjálp, uppliva skipanina.

Tosað var um at halda komandi fundir uttanfyri Havnina, har tað liggur fyri.

Næsti fundur verður hósdagin 25. mai klokkan 14 í Tilhaldinum.

Fundur lokin klokkan 14:30

Tórshavn 14-03-2023

Petur Rouch,
skrivari